# Boys In A Band og vinir í Mentanarhúsinum



Júst sum festival summarið gleið afturum, letur Mentanarhúsið í Fuglafirði konsert heystið upp, við sera spennandi rokk og elektro kvøldið. Ársins nýggja tónleikanavn í fjør sambært Planet Awards, Boys In A Band, og eitt av ársins mest spennandi nøvnum í ár, The Ghost fara á pall leygarkvøldið 1. September, við sær hava bólkarnir DJ Haze, so her skuldi verið talan um eina lívliga veitslu. Tiltakið byrjar klokkan 23:30

# Kvotuskerjing fær stórar avleiðingar



*Hesin nýggi trolarin kom til Vestmannaoyggjarnar fyrr í mánaðinum, men útlitini eru ikki tey bestu*

**Avgerðin hjá íslendsku stjórnini at skerja toskakvotuna kostar Vestmannaoyggjunum meiri enn 900 mió. krónur tey næstu trý árini**

VINNULÍV
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tað vakti stóran ans, tá íslendski fiskimálaráðharrin, Einar Guðfinsson, valdi at fylgja tilmælinum frá fiskifrøðingunum við at skarva ein triðing av toskakvotuni næsta fiskiár, og vinnulívsfólk og onnur ávaraðu um, at skerjingin kundi elva til skrædl nógvastaðni.

Tað hevur íslendska stjórnin eisini sannað. Sum eitt slag av endurgjaldi fyri ta skerdu toskakvotuna ætlar stjórnin at seta ferð á og at framskunda fleiri almennar íløgur, og tað skal so byrgja uppfyri, at tann skerda toskakvotan skal taka beinini undan lokalsamfeløgunum, har fiskivinnan hevur serliga stóran týdning. Eitt nú verða fleiri ætlaðar vegagerðir settar í verk fyrr enn annars ætlað.

## Oyggjarnar í serstøðu

Vestmannaoyggjarnar eru tað lokalsamfelagið, sum verður meinast rakt av kvotuskerjingini, og Oyggjarnar eru eisini í einari serstøðu, tí har ber ikki til at brúka vegarbeiði og aðrar líknandi íløgur til at avmarka avleiðingarnar.

Avgerðin hjá stjórnini at skarva triðingin av toskakvotuni ber í sær, at kvotan hjá skipunum í Vestmannaoyggjunum minkar úr 12.000 í 8.000 tons. Kommunan hevur síðani roknað seg fram til, at tað næsta árið fer kvotuskerjingin at kosta oyggjarsamfelagnum umleið 300 mió. krónur í okkara pengum. Verður skerjingin galdandi í trý ár, soleiðis sum stjórnin ætlar, fer niðurskurðurin tískil at kosta Vestmannaoyggjunum meiri enn 900 mió. krónur tey trý árini.

Á tíðindafundi fyri nøkrum døgum síðani segði borgarstjórin í Vestmannaoyggjunum, Elliði Vignisson, at tað almenna eigur at framskunda ætlanina at gera nýggja ferjuhavn í Oyggjunum, samstundis sum fleiri almenn størv mugu skipast í kommununi. Borgarstjórin vísti á, at fíggjarligi missurin tey næstu trý árini svarar til tað, sum tað kostar at reka kommununa í seks ár.







